Telefon: 311820 Fax: 314720 E-mail: post@sosialurin.fo

# Lego og Maersk samstarva

**LEIKUR.** Tvær av teimum stóru donsku fyritøkunum, Lego og Maersk Logistics, hava gjørt avtalu um samstarv. Framyvir verður tað Maersk-felagið, sum fær ábyrgdina av umsiting, sølu og goymslu av leikum og øðrum vørum hjá Lego.

Longu nú fer Maersk undir hesa uppgávu í suðureuropa, meðan norður- og miðeuropa verða yvirtikin seinni.

- Vit hava umskipað okkara virksemi, og tað hevur millum annað havt við sær, at vit ikki hava egin starvsfólk á teimum útlendsku marknaðunum. Vit hava ístaðin samstarvsfelagar, sigur Goran Wahlberg, sum er stjóri fyri Global Distribution hjá Lego.

Samstarvið við Maersk Logistics er partur av eini ætlan, sum Lego legði, tá felagið fekk sítt fyrsta undirskot í 1998.

# 44 tímar um døgnið við ítrótti

**SJÓNVARP.** Ein stovnur í Karlsruhe, sum gera analysur av fjølmiðlum, er komin fram til, at týskir sjónvarpshyggjarar í 1999 høvdu møguleikan at síggja ítrótt í týskum sjónvarpinum 44 tímar hvørt samdøgur.

Nógv verður gjørt við ítrótt í týskum sjónvarpi, og serliga er tað fótbólturin, sum fær ovmikið av senditíð. Í fjør vóru 4.600 tímar við fótbólti í týskum sjónvarpi.

Tað stóð ikki líka væl til hjá teimum, sum dáma tennis, tí tey fingu bert 1654 tímar við teirra ítrótti á skíggjanum...

# Stephen King gevur bók út á internetinum

**BØKUR.** Heimskendi rithøvundurin Stephen King fer 9. mars kl. 00:27 at geva eina nýggja bók út á internetinum. Tað er útgávufelagið Simon & Schuster, sum bara ætlar at geva hansara nýggjasta avrik út sum ein eBook, teir kalla.

Stephen King hevur selt ræðubøkur, sum eingin annar, og nýggjasta bókin er skrivað stutt eftir, at hann varð úti fyri einum álvarsligum óhappi. Hann var ákoyrdur av einum bili, og nýggja søgan snýr seg um ein tumlara.

Bókin kann keypast frá Simon & Schuster, og hon fer at kosta 2,5 dollarar – tað svarar til 20 krónur á leið.

– Eg gleði meg til at finna út av, hvat fólk halda um hetta. Kanska er hetta framtíðin, sigur King.

Í løtuni gongur filmurin The Green Mile, sum er bygdur á skaldsøgu hjá Stephen King í Havnar Bio, og filmurin er innstillaður til fleiri Oscar-virðislønir.



**Amerikanski rithøvundurin Stephen King gevur sína nýggju bók út á internetinum**

# Nýggj internet-útbúgving

**FJØLMIÐLAR.** Universitetið í Roskilde í Danmark fer í august mánaði at bjóða eina nýggja eftirútbúgving til journalistar, programfólk og kunningarfólk.

Útbúgving fer at verða rópt Master of Computer-Mediated Communication, og meginparturin av undirvísingini fer fram á internetinum. Gjøgnum parttíðarlesnað í tvey ár ber til at fáa eitt prógv í formiðling á internetinum.

Fólk fáa eina teoretiska og praktiska vitan um at viðgera, meta um, leggja til rættis og menna formiðling gjøgnum ymsar altjóða internetmiðlar.

Útbúgvingin kostar 40.000 krónur um árið, og hon er fyri fólk, sum ætla at nýta ella gerast betri til at skriva á internetinum.

Fleiri upplýsingar fáast á www.cmc.ruc.dk.

# Blaðfólkini trívast illa

**FJØLMIÐLAR.** Fólkini, sum starvast á størsta blaðnum í Danmark, trívast illa á arbeiðsplásinum. Átta út av 10 høvdu farið í annað starv, um tey fingu eitt tilboð.

Hetta vísir ein kanning, sum er gjørd av arbeiðsumhvørinum á Jyllands-Postinum, skrivar blaðið Journalisten.

Sambært fyrrverandi blaðfólkum á blaðnum, er tað leiðslan, sum hevur skuldina av vánaligu støðuni.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Wed 01. Mar. 1999
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** info@nordinst.aland.fi
**Reply to:** info@nordinst.aland.fi

TELDU-POSTURIN

# EU góðtekur ikki svenskan rúsdrekkapolitikk

Mánadagin 6. mars var EU-kommissionerurin, Frits Bolkestein, í Stockholm fyri at tosa við stjórnina um innflutning av tubakki og alkoholi til Svøríki.

Sviar fingu undantaksloyvi, tá teir gjørdust limir í EU í 1995 og gongur hetta út 30. juni. Enn er eingin umsøkn komin frá Svøríki um at leingja undantaksloyvið, og Bolkestein er heldur ikki sinnaður at leingja tað.

**Svenska undantakid**

EU loyvir innflutningi av alkoholi og tubakki frá øðrum limalandi, so leingi tað er til privata nýtslu. Hetta er eingin dropanøgd. Tú hevur rætt til at innflyta 800 sigarettir, 110 litrar av øli, 90 litrar av víni, 20 litrar av heitvíni og 10 litrar av spiritusi. Skalt tú skipa fyri brúdleypi ella størru veitslu, hevur tú rætt at innflyta størri nøgd. Alt hetta kann innflytast uttan mun til, hvussu leingi tú hevur verið uttanlands.

Svøríki loyvir innflutningi av 300 sigarettum, 15 litrum av øli, 5 litrum av víni, 3 litrum av heitvíni og einum litri av spiritus.

Sigarettir og rúsdrekkavørur eru munandi bíligari í hinum EU-londunum orsaka av einum lægri avgjaldi. Hvørt land í EU ásetur avgjaldið, tó ásetur EU minst loyvda markið. Helvtin av EU-londunum hava ongan skatt á víni, meðan Svøríki leggur 27 kr. á hvønn litur av víni. Á ølið leggja tey flestu limalondini 16 oyru á liturin fyri 5% øl. 16 oyru er mista avgjaldið. Svøríki leggur 1,47 kr. á liturin.

**EU – ein marknaður**

Bolkestein hevur fyrst og fremst vitjað í Stockholm fyri at greiða svium frá týdninginum av, at reglarnar fyri innara marknaðin í EU verða fylgdar.

Eitt er at lond fáa undantaksloyvi, tá tey gerast limir, annað er at bygnaðurin í EU ikki kann vera samansettur av undantaksloyvum. Kappingin innan EU kan bert økjast við, at brúkarin kann keypa sínar vørur, har tær eru bíligast, og tí vil Bolkestein arbeiða fyri at fáa eins reglur fyri øll lond.

Ringt er at siga nei til undantaksloyvi til nýggj limalond, tá fleiri av limunum hava undantaksloyvi, og hesum vil kommisserurin tí byrgja fyri.

**Svenski fíggjarmálarádharrin vónsvikin**

Bosse Ringholm, fíggjarmálaráðharri, var ikki sørt vónsvikin av vitjanini. Hann hevði ímyndað sær, at Svøríki kundi fáa eina hækkanar-avtalu sum Finland og Danmark.

Finland hevur seravtalutil 2003 og Danmark til 2004. Ringholm harmast millum annað um, at bíligari rúsdrekka vil økja um rúsdrekkanýtsluna og harvið misnýtsluna. Hesum afturvísur tó ein kanning frá lærda háskúlanum í Lund. Ringt er at sammeta rúsdrekkanýtsluna í Svøríki við onnur lond, tí myrkatalið er mett at vera rættiliga stórst.

**Avgjaldið**

Ein pakki av sigarettum kostar 34,50, ein fløska av Johnny Walker 280 kr., og ein fløska av miðalgóðum víni kostar 15 – 20 kr. meiri enn í Danmark – ella eini 60 kr.

Á øðrum hvørjum arbeiðsplássi kanst tú keypa bæði sigarettir og spiritus til hálvan prís. Hetta eru smuglaravørur, ið ósmædnar verða koyrdar runt frá arbeiðsplássi til arbeiðspláss. Jú hægri avgjaldið er vorðið, jú størri er ferðslan av innfluttum loynivørum blivin, og tað sama er at siga um heimabrenningina, ið er í hæddini í hesum árum.

Toll- og løgregluvaldið megnar at leggja hond á eini 10% av ólógligu vørunum. Hetta sigur tó ikki nakað um teirra dygd, men meiri um arbeiðsorku, og hvussu umfatandi svarti marknaðurin í veruleikanum er.

**Kirstin Didriksen, Stockholm**





## FØÐINGAR

29. februar fingu Anna Maria Justesen og Eyðun Gaard, Viðareiði, ein son. Hann var 48 cm. langur og vigaði 3305 gr.

1. mars fingu Fanny Petersen og Bjarni Poulsen, Viðareiði, eina dóttir. Hon var 57 cm. long og vigaði 4200 gr.

2. mars fingu Malan Hansen og Torben Nielsen, Glyvrar, eina dóttir. Hon var 56 cm. long og vigaði 4100 gr.

3. mars fingu Sigrið Henriksen og Elias Jacobsen, Sørvágur, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 3920 gr.

3. mars fingu Annika og Jónsvein Nystrøm, Syðrugøta, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 4150 gr.

3. mars fingu Turið Kjølbro og John Egholm, Velbastaður, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 4100 gr.

3. mars fingu Annfríð og Magnus Neslíð, Toftir, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4000 gr.

5. mars fingu Heðin og Jana Mortensen, Hoyvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3325 gr.

6. mars fingu Gudny Fossaberg og Egil Ellingsgaard, Hoyvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3050 gr.

7. mars fingu Anna S. Vang og Finnur Joensen, Kvívík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 2590 gr.

7. mars fingu Sigrid Midjord og Kenneth á Argjaboða, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3145 gr.

8. mars fingu Tóra Hjørleifsdóttir og Jørgin M.Á. við Úlvsá, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3200 gr.



## ANDLÁT

3. mars:
**Hans í Beiti,** Sørvágur, 85 ár
4. mars:
**Joen Pauli Garðalíð,** Palli, Vestmanna, 64 ár
**Dagny Debes,** Tvøroyri, 76 ár
5. mars:
**Gunnhild Eliasen,** fødd Poulsen, ættað av Kirkju, búsitandi í Havn, 86 ár
6. mars:
**Ómar Elvarson,** Reykjavík, sonur Elvar Jón Fribertson og Steindoru Andreasen, úr Leirvík, 24 ár
**Niclas Norðoy,** ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Keypmannahavn, 52 ár
8. mars:
**Tummas Fugløy,** Hattarvík, 58 ár

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 11. mars:* Andreas Poulsen, tlf. 441086
*Sunnudagin 12. mars:* Hálvdan Simonsen, tlf. 441490

**Norðoyggjar:**
Sigvald Kristiansen, tlf. 455045

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

**Tannlæknavakt,** Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.

## 85 ár

**Týsdagin 14. mars verður Johan Syderbø í Klaksvík, 85 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá soninum Jógvani, á Garðavegi 19, millum kl. 16 og 20.**

## KIRKJUR & SAMKOMUR

**Føstugudstænastur**

**Sunnudagin 12. mars**
*Sandavágur:* kl. 18, Uni Næs
*Kvívík:* kl. 17, urguleikari: M. Bjartalíð

**1. sunnudag í føstu**
*Havnar kirkja:* kl. 11., Erland Beder
*Kaldbak:* kl. 12, altarg., Sonja Klein
*Kirkjubøur:* kl. 12.15, Heri Joensen
*Rituvík:* kl. 11, Jónsvein Bech
*Fríðrikskirkjan:* **kl. 20.30.** Konsert við United Voices
*Hvalvík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Tjørnuvík:* kl. 12, Martin R. Jacobsen
*Kvívík*. kl. 12, Hans J. Joensen, biskupur
*Vesturkirkjan:* kl. 11, barnagudstænasta, Heri Joensen
*Argir:* kl. 11, barnagudstænasta, Bergur D. Joensen
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10,
*Christianskirkjan:* kl. 11,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
*Mikladalur:* kl. 12, útvarpsgudstænasta. Niels Pauli Danielsen
*Eiði:* kl. 11.40, skriftamál, kl. 12 messa (í missiónshúsinum)
*Norðskála:* kl. 17, messa, Emil Olsen
*Skála:* kl. 11,
*Selatrað:* kl. 17, Jógvan Fríðriksson
*Vágur: kl. 11, altarg.,*
Hov: kl. 13, Elsa Funding
*Skopun:* kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
*Bøur:* kl. 12,
*Miðvágur:* kl. 15, familjugudstænasta, Uni Næs
*Sumba:* kl. 12, Ólavur Rasmussen

*Sandavágs kirkja: Sunnudagin gongur talvan fyri Sunnudagsblaðið.*

**Frá Ebenezer**
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti og kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
Sunnudag kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13: Sunnudagsskúli, kl. 19: Møti.

**Missiónsvikan á Hvítanesi**
verður 31. mars-2. apríl.

**Rhema á Hálsi**
Sunnudagin kl. 17: Møti og sunnudagsskúli, Eivind Bringsberg o.o luttaka.
Mánadag til fríggjadag kl. 6: Morgunbøn.
Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið í Havn**
Sunnudagin kl. 18 familjumøti v/ Niels Juul og Birgith Olsen.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 18 Sangkórið í Hebron luttekur. Mánadagin 13. mars hugnaløta fyri 12-16 ára gomul.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 06 morgunbøn, kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 06 morgunbøn, kl. 11 morgungudstænasta, kl. 18 møti, kl. 22 útimøti (um viðrar).
Mánadagin kl. 06 morgunbøn, kl. 20 bønarsamkomufundur.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti, har Egin Hendriksen við fam. luttaka.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Anniku og Alfred, Hákunargøta 5. Verið øll hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoma v/ Dávid Johannesen, presti. Evni: Trúbótin, í samband við 1000 ára haldi fyri kristniboðanini.
Týsdagin kl. 16 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**1000-ára haldið**
**Kirkjan, Kollafirði**
Sunnudagin kl. 16: Fyrilestur og konsert við Vestmanna sangkóri. David Johannesen: Evni: Martin Luther.

**Saron, Vestmanna**
Vikuskiftismøti heldur fram í kvøld kl. 20, Sam Jacobsen talar.
Sunnumorgunin kl. 11 morgunmøti, Eyðun Miðberg talar. og kl. 18 endar vikuskiftismøti við Dánjal og Lív á Dul Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kirkjan, Norðskála**
Sunnudagsskúli verður í morgin 12. mars kl. 14.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli og kl. 19 møti við Jógvan presti.
Mánadagin kl. 19.30 kvinnumøti hjá Sjómanskvinnuringinum, Selatrað, Strendur, Hvalvík og Skálabotnur vera við.
Hjartaliga vælkomnar allar kvinnur.

**Keldan, Skálafirði**
Ungdómslegan byrjar fríggjakvøldið kl. 20. Opið hús verður leygarkvøldið kl. 20, øll kunnu vera við.
Sunnudagin kl. 17: Møti við ungdómi í Kelduni, barnamøti kl. 17. http://kort.olivant.fo/~keldan/

**Funningsfjørður**
Leygarkvøldið kl. 20 talar Ámund Berthelsen, menn av Strondum syngja.
Sunnukvøldið kl. 18 talar Knút Larsen, Hannis syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**1000-ára haldið**
**Klaksvík, kirkjukjallarin**
Sunnudagin kl. 16: Fyrilestur. Felagssangur saman við kirkjusangarum, Martin R. Jacobsen, evni: Apostólsku fedrarnir.

**1000-ára haldið**
**Bygdahúsið í Dali**
Fyrilestur og konsert við Sandoyar manskóri, Sverri Egholm, evni: Heidnir siðir upp í okkara øld.

**Missiónshúsið í Skopun**
Leygarkvøldið kl. 20 møti v/Alfred Petersen, tær 4 ungu syngja, innsavnan til arbeiði.
Sunnudagin kl. 15 familjumøti. Aftaná verður saft og køkur at fáa. Sunnukvøldið kl. 19 møti v/ Regin Høgnesen, Sandoyarbrøðurnir syngja. Innsavnan til húsið. Bønarmøti er 1/2 tíma undan hvørjum møti.
Fríggja-, leygar- og sunnukvøldið er drekka og eftirmøti aftaná møtini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Onki møti verður sunnukvøldið vegna missiónsviku í Vági. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11, breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskur fundur, Osvald Kjærbo.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbygg. fundur.

**Samkoman, Sion Vági**
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

**Århus**
Føroyskt møti í »Carmel« missiónshúsið (Klosterport nr. 6 – út móti Nørre Alle) leygarkvøldið 18. mars kl. 19.30 v/ Heri Elttør trúboðara. Kaffi verður eftir møti. Øll vælkomin.

**Ålborg**
Føroyskt møti verður í missiónshúsinum í Ålborg (Jernbanegade 16) sunnudagin 12. mars kl. 17 v/Hera Elttør, trúboðara. Kaffi verður eftir møti. Øll eru vælkomin.

## Gullbrúdleyp

**Um Gud vil, hava hjúnini Ruth og Robert á Lakjuni, Fuglafjørður, gullbrúdleyp leygardagin 25. mars. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 17.00.**

**Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma, kunnu tekna seg innan 17. mars á tlf. 444332 ella 315390.**